Starvsfólk til Barnaverndartænastuna í Sundalagnum

sansir.fo

Søkt verður eftir starvsfólki til barnaverndartænastuna at byrja 1. januar 2007, ella eftir nærri avtalu. Talan er um fulltíðarstarv.

Viðkomandi fer í tøttum samstarvi við leiðaran á deildini at taka tær av málsviðgerð av barnaverndarmálum, ið m.a. fevnir um heimavitjanir, at ráðgeva børnum og/ella familjum teirra, at samstarva við stuðlar og at seta teir í starv, umframt alt vanligt skrivstovuarbeiði. Samskift verður við almennar stovnar, løgreglu, skúlar, dagstovnar og dagrøkt, læknar og heilsurøktarfrøðingar.

Barnaverndartænastan heldur til á kommunuskrivstovuni á Oyrarbakka og nakað av ferðing er knýtt at starvinum.

Vit ynskja, at tú hevur
- eina hóskandi útbúgving, eitt nú sum sosialráðgevi, námsfrøðingur ella líknandi
- breiða vitan og góðan førleika at orða teg bæði munnliga og skrivliga
- telduførleika á brúkarastøði
- evni til at arbeiða tvørfakliga.

Setanarviðurskifti
Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á sosialu deild á tlf. nr. 471022 ella 771023.

Umsóknir við prógvum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 5. desembur 2006, og skulu sendast til:

Sunda kommunu
Sosiala deild
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki

Barnaverndartænastan er skipað í samstarvi millum Sunda-, Eiðis-, Hvannasunds-, Viðareiðis- og Húsa kommunur, og er partur av Sosialu deild í Sunda kommunu. Í hesum kommunum búgva stívliga 3000 fólk.

Sankta Frans skúli
Varðagøta 10 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 302530 · Fax 302531
www.skulin.fo/fra

Lærarastarv í Sankta Frans skúla

Søkt verður eftir lærara í tíðaravmarkað starv frá 15. januar til 30. juni 2007 fyri lærara í barnsburðarfarloyvi umframt at lesa nakrar avlopstímar.

Starvið er fulltíðarstarv og eru lærugreinirnar: Søga og danskt í 5. flokki, rokning í 1. flokki og ítrótt í 7. flokki. Harumframt avlopstímar í smíð í 5. og 6. flokki.

Søkt verður eftir lærara, sum:
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- er við til áhaldandi at menna skúlan

Førleikakrøv:
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum.

Lønar- og setanartreytir:
Starvið verður lønt í lønarflokkunum 18.1-27.4. sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Umsóknir:
Umsóknir við avrit av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í **seinasta lagi týsdagin 28. november 2006 kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið hjá Selmar Jacobsen, skúlastjóra, á telefon 302532 ella 220716.

Í Sankta Frans skúla eru 340 næmingar í forskúla til 7. flokk. Í skúlanum starvast 30 lærarar. Skúlin hevur ein lærarahóp, ið fakliga røkkur víða og arbeitt verður alsamt við at menna skúlan.

Starvsfólk til Starvsfólkadeildina á Føroya Tele

"Tá ið eg eygleiði meg sjálvan og mín hugsunarhátt, má eg viðgangga, at mínar hugflogsgávur hava havt meira at siga fyri meg enn evnini at nema nýggja vitan"

- Albert Einstein



Til Starvsfólkadeild okkara søkja vit eftir einum fólki, sum saman við verandi manning skal menna fyritøkuna at taka móti teimum avbjóðingum á starvsfólkaøkinum, sum nútíðar og framtíðar marknaður og menning krevja.

Starvsfólkadeildin á Føroya Tele telur í løtuni tvey starvsfólk, sum í tøttum samstarvi við lønarbókhaldið og stjórnarskrivstovuna avgreiða øll starvsfólkaviðurskifti á Føroya Tele. Eisini er Starvsfólkadeildin virkin í tilgongdum og verkætlanum ymsa staðni í fyritøkuni.

Starvið er stápsfunktión hjá stjóranum í Móðurfelagnum og er skipað undir leiðaranum á Stjórnardeildini.

Vit ímynda okkum, at tann, ið verður sett/-ur skal:
- hava viðkomandi útbúgving, grundaða á leiðslu og tað "at handfara fólki" – sjúkrarøktarfrøðingur, lærari, sosialráðgevi, HD í leiðslu og fyriskipan, cand. merc. í HRM, NLP-coach ella líknandi
- kenna seg væl við at standa frammanfyri nógvum fólkum – bæði veruligt og tykisligt
- førur fyri at bera fram ein greiðan boðskap – bæði munnliga og skrivliga
- kunna taka sjálvstøðugar avgerðir og seta tær í verk
- duga væl við fólki

Eisini má viðkomandi vera til reiðar at útbúgva seg í mun til krøv og ynski hjá Føroya Tele.

Arbeiðið umfatar:
- hugskotsgeving og coaching, herundir HR-menning av starvsfólki og leiðarum
- umsiting av sáttmálaviðurskiftum
- gerð, umsiting og tulking av innanhýsis politikkum
- handfaring av setanum og uppsagnum
- vanligt skrivstovuarbeiði í samband við starvsfólkaviðurskifti

Setanarviðurskifti og løn verða ásett eftir avtalu.

Neyvari upplýsingar fáast við at venda sær til Djóna Dalsgarð á Starvsfólkadeildini, tel 303030.

Umsóknir skulu vera FøroyaTele í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. november 2006 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

Føroya Tele er samtak við Móðurfelag, FT Net, FT Samskifti og Televarpinum. Í samtakinum eru 235 starvsfólk við sera fjølbroyttum útbúgvingum og royndum.
Á Føroya Tele taka vit ikki dagar ímillum ættarslag, húðarlit, tjóðskap og etniskan uppruna, trúgv ella kynsliga sannføring.

FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum!